# Søgan um 75 ára gamla blinda fiskimannin

**Í hesi grein verður lýst áhugaverda sambandið millum Syðrugøtu og Rituvík. Hetta samband byrjar við Ólastovu í Syðrugøtu**

Ofta er tað tann reina tilvild, sum ger, at ein kemur fram á eina góða søgu. Leitaði eftir eini heilt aðrari grein í Dimmalætting fyri 1928. Beint við hana stóð hendan greinin:

## Joen Jacob Petersen

*At være Fisker om Bord paa vore Kuttere til Islands- og Grønlandsfiskeri hører til de anstrengende og farefulde Arbejder, hvor man umiddelbart mener, at den Mand, som giver sig i lag dermed maa være baade ung og rask og rørig og have alle sine Sansers fulde Brug. Og Øjnene skulde synes at være den mest uundværelige af alle Sanserne, naar man skal gøre Tjeneste paa en Fiskekutter.*

*Den Mand, hvis Billede staar over disse Linier, er derfor et ret enestaaende Eksemplar inden for vore Fiskerkutteres Mandskab. Og man kan ikki andet end bøje sig i beundring for den Energi og Arbejdsvilje, han er i Besiddelse af, naar han endnu Aar efter Aar tager med ud paa Kutterfiskeri forbi de 70 Aar og har desuden været aldeles blind i mange Aar. Han kunde godt blive hjemme og ladet sig pleje af Hustru og Voksne Børn, som han har mange af. Men han foretrækker alligevel at gaa med paa Fiskeri. Og har aldrig endnu været den ringeste om Bord paa sit skib.*

*Men dette tilfælde taler ogsaa i høj Grad til fordel for det færøske Fiskermandskab. Thi den mere end 70 Aarige blinde Mand kunde trods al hans Energi og Dygtighed ikke være Fisker om Bord, hvis han ikke fandt Forstaaelse og Hjælp og mangen en Haandsrækning fra det øvrige Mandskab.*

*Joen Jacob Petersen stammer fra Gøte, men hører til Nybyggerne i Ridevig, der har fostret saa mange gæve Fiskere og Skibsførere.*


SAMVIRKI
ORGAN FOR DANSK-FÆRØSK SAMARBEJDE
Udgiver og Redaktør: Poul Niclasen.
Nr. 9—10. NOVEMBER - DECEMBER 1939. 1. Aargang.
SAMVIRKI FÆRØERNE OG DANMARK

*Hetta er høvdið á seinasta nr. av Samvirki, sum var ein áhugaverd roynd við kunning Føroya og Danmarkar ímillum*

## Úr Ólastovu

Greinin er helst skrivað av prestinum Absalon Joensen, og eftirnavnið gav eina ábending um at Jóan Jakku var ættaður úr Ólastovu í Syðrugøtu.

Hetta fekst eisini váttað frá Nenu hjá Poul Amaljari Mikkelsen úr Syðrugøtu, hvørs mamma var úr Rituvík.

Hon hevði eitt yvirlit yvir teir, sum bygdu Rituvík. Og Jóan Jakku var tann, sum í 1880 bygdi sjeynda húsið í Rituvík.

Joen Jacob var føddur 17. november 1851 og hevur tískil verið 76-77 ár, tá ið henda grein hevur verið skrivað, tá ið hann framvegis var til skips.

Foreldrini hjá honum vóru Peter Jacobsen, Syðrugøtu og Anna Elisabeth Petersdatter úr Norðragøtu. Kona hansara var Johanna Hansen, f. 6. august 1854 úti á Rætt á Nesi. Hon var dóttir Justines Hansen úr Túni á Toftum og Marionnu Joensdatter úr Trongisvági. Tey vórðu vígd í Nes kirkju 11. desember 1881 av Th. Sørensen, prósti. Tey áttu seks dreingir og eina gentu: Peter Jacob, Justinus Juul, Marius, Adrian, Anton, Tummas Hans og Katrine Sophie.

Her er sjálvsagt ein stór ætt komin undan. Ein kendur abbasonur var Per Petersen, sum hevði kioskina á mjólkarbátinum Tróndi í mong ár.

Per var sonur Petur Jakku hjá Jóan Jakku. Mamma hansara Inga var dóttir fyrsta niðursetumann í Rituvík, Per. Hon gjørdist sjúk, og tá kom Per sum smádrongur til Gøtu at vera hjá mostrini Perlinu, og hann var í Gøtu til hann var um 12 ár. Sum eldri greiddi hann frá sínum lívi í sjónvarpinum. "Eg var so heppin," segði hann, "at eg áttu tríggjar mammur. Eina í Gøtu, eina í Rituvík og eina í Danmark". Henni búði hann hjá, tá ið hann giftist í Danmark við Sonnu, ættað úr Rituvík. Tey fóru niður undan krígnum og sluppu ikki heim aftur.

Per føldi seg eisini nær knýttan til familjuna hjá Poul Amaljari, har hann búði. Hann segði í hesi sending, at tíðin í Gøtu hevði havt nógv at siga fyri seg.

Ein kann undra seg yvir, at ein gøtumaður setur seg niður í Rituvík saman við monnum frá grannabygdunum. Men kanska hevur konan gjørt munin. Hon var av Nesi, og fimm av niðursetukonunum vóru haðani.

Annars var bóndin, ið átti hagan har, sera framburðssinnaður, so tað hevur verið rímiliga lætt at fáa gerði í Rituvík. Tað sigst eisini, at gerðini, hann máldi niðursetumonnunum, vóru størri enn vanlig traðarstykki.

Jóan Jakku var ikki einsamallur úr Gøtu í Rituvík. Fimta húsið hevði konu úr Syðrugøtu. Maðurin var Magnus Olsen, f. 28. juni 1853 á Nesi. Kona hansara var Sara Malena Huusgaard, dóttir Elias Petersen, bóndi í Húsgarði úr Syðrugøtu, og Onnu Sofíu, fødd Weihe, úr Søldarfirði. Tey vórðu gift 1. mai 1878. Tey fingu átta børn: Jógvan, Elias, Benediktus, Anne Sofie, Maren Malene, Hendrik Magnus og Olerikka.

## Døtur Per komu til Gøtu

So kann eisini verða nevnt, at fyrstu niðursetufólkini vóru Per Højgaard, f. 21. september 1851 á Toftum og Nicolina f. Thorkilshøj f. 17. mars 1854 av Nesi. Tey vórðu vígd 4. august 1873 á Nesi.

Tað fyrsta árið búðu tey einsamøll í Rituvík. Per mátti tá við leypi á baki fara til gongu til Toftir, tá ið hann skuldi til útróðrar saman við brøðrunum. Um kvøldið skuldi hann aftur til Rituvíkar við sínum parti av fiskinum. Heima sótu kona og dóttir einsamøll í oyðimørkini. Síðani flutti beiggi Per, Dánjal Petur, og aftaná hann Søren Lamhauge úr Lamba til Rituvíkar, og tá kundu teir manna bát í Rituvík.

Per og Nicolina fingu 12 børn, og tvær av døtrunum giftust til Syðrugøtu. Onnur var Anna, sum giftist við Tummas har Niðri, og hin var Perlina, sum varð gift við Poul Amaliel hjá Petur Paula í Barbustovu.



*Hendan myndin av niðursetufólki í Rituvík er í greinini hjá Johan Poulsen og kallast "Nogle af Ridevigs ældste Beboere." Tey eru øll niðursetufólk.* ***Fremsta rað:*** *Vinstrumegin eru hjúnini Lisa og Hans Pauli Højgaard. Næst teimum er Lotta, einkja eftir Óla Joensen. Tey vóru omma og abbi Sámal, sum giftist við Simonu á Túvu úr Gøtu. Uttast t.h. hjúnini Johanna og Jóan Jakku Petersen.* ***Aftast:*** *Uttast t.v. er Nicolina, einkja eftir Per Højgaard. Næst henni Sanna, systir Nicolinu og einkja eftir Johan Christian Højgaard. Síðan Daniel Petur Højgaard, Amalia, einkja eftir Søren Lamhauge. Myndin er tikin nakað undan 1939, tí fleiri á myndini eru deyð tá.*

## Edda

Fyri at fáa meira at vita um hetta, varð avrátt at fara at tosa við Eddu. Fyrst eg minnist, búðu hon og mammubeiggin, Símun, í Ólastovu. Hann var bróðursonur Jóan Jakku. Tá ið Símun, sum var ógiftur, doyði, varð hon so einsamøll eftir. Nú er Edda á sambýlinum Gøtubrá. Hon er 91 ár og framvegis sera skilagóð. Tað kundi vera, at hon visti okkurt.

Fyrst kann sigast, at Edda eisini hevur eina serliga søgu, sum lýsir liviumstøðurnar hjá fólki í Føroyum. Pápi Eddu, Edvard Joensen, var av Toftum. Hann giftist fyrst við Elsebeth Mariu. Tey fingu Eddu, men mamman doyði í barsilssong. Edda fór til Gøtu at vera hjá ommuni og abbanum, sum vóru Sigga, f. 1859, og Sámal Petersen,